STUDNI
Student Grant Fund

## Vegleiðing
# Ferðastudningur til verkætlanir

**1. Hvat er endamálið við ferðastudninginum til verkætlanir?**
Endamálið við ferðastudninginum til verkætlanir er at stuðla lesandi føroyingum á hægri lærustovnum í Føroyum og uttanlands í samband við størri verkætlanir, ið skulu gerast í øðrum landi enn í lestrarlandinum. Hetta verður gjørt við at veita studning til ferðina millum lestrarlandið og landið, har verkætlanin skal gerast.

**2. Hvat skilst við eina verkætlan?**
Við einari verkætlan skilst:
a) størri uppgáva í samband við hægri lesnað. Talan skal verða um høvuðsuppgávu ella størri ritgerð ella kanningarferð, ið er kravdur partur av lestri, ið telur í minsta lagi 10 ects
b) starvsvenjing í minsta lagi 2 vikur t.d. á læraraskúla og
c) uppihald á øðrum lærustovni herundir skiftislestur. Sum annað dømi um hetta kunnu nevnast Nordkurs-summarskeiðini í Norðurlondum.

**3. Treytir fyri at fáa ferðastudningin til verkætlanir.**
Heimilaður til ferðastudning er umsøkjari, ið lýkur fylgjandi treytir:
1) Umsøkjarin skal hava serligt tilknýti til Føroyar og kravið er:
   - at umsøkjarin hevur búð í Føroyum í minsta lagi tvey av teimum seinastu trimum árunum beint undan lestrarbyrjan, *ella*
   - at umsøkjarin hevur búð í Føroyum í minsta lagi helvtina av lívinum áðrenn lestrarbyrjan.
2) Umsøkjarin skal ganga á eini góðkendari hægri fulltíðarútbúgving, ið er 2 lestrarár ella longri. Stuðul fæst eisini til MA- lestur, ið er styttri enn 2 ár og til heiltíðarútbúgving til heilsuhjálpara ella heilsurøktara.
3) Umsøkjarin skal vera lestrarvirkin.
   - Umsøkjari er lestrarvirkin, um hann ikki er meira enn eitt ár afturúr í lesnaðinum í mun til ásettu lestrartíðina. Harafturat skal tann lesandi møta til frálæruna, lata inn kravdar uppgávur og fara til próvtøkurnar eftir teimum reglum, sum eru galdandi á útbúgvingarstovninum.
4) Umsøkjari kann bert partvís fáa løn í útbúgvingartíðini.
   - Umsøkjari í partvís løntari útbúgving er ikki stuðulsheimilaður, um meira enn ½ av útbúgvingartíðarskeiðnum er lønt.

Harumframt skal verkætlanin vera partur av útbúgvingini og góðkennast av útbúgvingarstaðnum. Vert er eisini at leggja merki til, at tað bert verður veittur studningur fyri ferðing millum lond, og at tann lesandi í mesta lagi hevur møguleika at fáa henda studning tvær ferðir í samlaðu útbúgvingartíðini og bert til eina ferð aftur og fram í hvørjari verkætlan.

**4. Mannagongd, studningsupphæddir og útgjaldingarháttur.**
Ætlar tú at søkja um studning, kann hetta antin gerast, áðrenn farið verður undir verkætlanina ella meðan tú ert í gongd við verkætlanina. Tað ber ikki til at søkja um studning eftir at verkætlanin er liðug.

Fyrst verður útfylta umsóknarblaðið “Umsókn um ferðastudning til verkætlanir” sent Studna. Minst í hesum sambandi serliga til at geva eina greiða lýsing av verkætlanini og at fáa váttan frá lærustovninum um, at verkætlanin

er ein partur av útbúgvingini og er góðkend av lærustovninum.

Allir umsøkjarar fáa svar. Er svarið játtandi, verður ein tilsøgn send tær um, at studningur verður veittur.

Studningurin verður útgoldin, tá Studni hevur fingið tann goldna ferðaseðilin í samband við verkætlanina. Tó verður ikki útgoldið fyrr enn 2 vikur undan fráferð. Studningurin verður tann skjalprógvaða upphæddin av ferð millum lond til vanligan ferðaseðlakostnað, tó í mesta lagi kr. 1.500 millum Føroyar og Danmark, kr. 3.100 millum Føroyar og lond í Evropa ( - Danmark og Grønland) og kr. 4.100 millum Føroyar og lond uttanfyri Evropa. Síðani verður peningurin goldin á kontu í einum føroyskum ella útlendskum peningastovni.

**5. Kærumøguleikar.**
Til ber at kæra avgerðir, sum Studni hevur tikið, til Kærunevndina. Seinasta freist at kæra er 6 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað.

Kærur skulu sendast til:

Føroya Kærustovnur
Undir Hornabakka
Postsmoga 45
FO-110 Tórshavn